# Haldið Sosialin!

400,- kr. um ársfjórðingin

- sparið 380,- kr.
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr.: ____________

Bygd/býur: ____________

Telefon nr.: ____________

Undirskrift: ____________

Ókeypis
Verður sent
ópostað
Sosialurin
rindar
postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin




# Fíggjartrot størsti trupulleikin

**Leygardagin var kjakfundur um apopleksi í Útvarpshøllini**

APOPLEKSI
*Torkil V. Rasmussen*

Leygardagin var tiltak um heilasjúkuna Apopleksi í Útvarpshøllini. Heilt fitt av fólki var møtt upp, og varð kanningin av viðurskiftunum hjá apopleksiraktum í Føroyum, sum Heilafelagið hevur biðið Granskingardepilin gjørt, handað almenninginum. Kanningin hevur fingið heitið Granskingarverkætlanin fyri Økismenning, og er tað Dennis Holm sum var verkætlanarleiðari í kanningini.

Tiltakið byrjaði við, at læknin, sum er leiðari á medisinsku deild á Landssjúkrahúsinum, Lars Storm, greiddi eitt sindur frá, hvat apopleksi er fyri nakað.

## Apopleksi

Apopleksi er ein heilasjúka. Orsøkin til heilasjúkuna er tann, at ein æðr í heilanum fær ein tøpp, sum í flestu førum seinni mennist til eina heilabløðing, orsaka av at trýstið á æðrina er somikið stórt, at hol fæst á. Apopleksi kenna vit betur sum heilabløðing, segði Lars Storm.

## Ov neilig tøl

Aftaná Lars Storm helt Dennis Holm verkætlanarleiðari ein frágreiðing um tølini í kanningini. Víst var m.a. á, at møguleikarnir til eftirvenjingarumstøður aftaná eina harða viðgerð av Apopleksi, ikki eru til staðar í føroyska samfelagnum. Tey ið hava verið rakt av Apopleksi og hava tørv á antinn endurútbúgvingarmøguleikum, verkstøðum ella eftirvenjingarumstøðum verða í størstan mun send til Danmarkar. Ein annar av mongu trupulleikunum í føroyska samfelagnum, tá ið umrøður Apopleksi er, at flestu spurdu siga seg ikki hava verðið kunnaði um møguleikarnar aftaná viðgerðina, greiddi Dennis Holm frá.

## Vardir verkstaðir

Vardir verkstaðir eru tó nakað, ið føroyska samfelagið hevur at bjóða teimum, ið hava verið rakt av Apopleksi. Endamálið við vardum verkstøðum er at veita tilboð um arbeiði til teirra, ið ikki hava fullan arbeiðsførleika.

Í løtuni eru vardir verkstaðir at finna í Tórshavn, Klaksvík og í Vági. Umframt hetta er møguleiki fyri at fáa dagtilboð í Sørvági. Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður við almannamálum, boðaði frá at fyrsta sambýlið fyri tey við serligum tørvi verður tikið í nýtslu í hesu vikuni.



*Lars Storm var fyrsti fyrilestrarhaldarin á fundinum leygardagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Á hvønn hátt ger sjúkan vart við seg?

Í fyrstu syftu ger sjúkan vart við seg, at tann rakti kennir seg móðan, hevur høvuðpínu ella svevur meiri enn vant. Men sjúkan kann tó eisini koma heldur knappliga og púra óvart á tann rakta.

Fyrstu dagarnar kann gerast torført at gita, hvat ið galið er, og gongur tað heldur seint við at fata tað, ið er hent síðstu dagarnar. Lamningur, ov spentir vøddar, broyttur følisansur, sjónsansur ella ljóðsansur, sálarligar og intellektuellar broytingar og kensluligar fylgjur eru vanligastu sjúkueyðkennini. Vanliga verða fólk við Apopleksi innløgd, sigur Lars Storm.

## Fíggjarligt trot

Tey ið verða innløgd, verða í stóran mun løgd út á medisinsku deild, og eru tað heldur tey fáu, ið kunnu nýta gagn av seingjunum, sum eru á Apopleksideildini úti í Landssjúkrahúsinum. Trupulleikin er fíggjarligt trot, ið ikki kann nøkta tørvin á seingjum á Apopleksideildini.

Samanumtikið var tiltakið sera væleydnað og kunnandi. Hugt var eftir menniskjaliga og samfelagsbúskaparliga týdninginum av, at betra um korini fíggjarliga og andliga hjá apopleksiraktum fólki í Føroyum.

# Poplist 2



FLØGUÚTGAVA
*Starvsnæmingur*
*Annika S. Biskopstø*

Fyri einum árið síðani kom Poplist 1 út á marknaðin. Tað var 3-arin í SMS og plátufelagið Tutl sum góvu út fløguna. Á úgávuni vóru kendir føroyskir tónar frá ymsum tónasmiðjum kring landið. Fløgan varð væl umtókt og rakti ein breiðan aldursbólk. Í ár er enn ein Poplist fløga komin út á marknaðin.

Sosialurin hevur havt eitt prát við Høgna Zachariassen ein av fyriskiparnum handan Poplist fløgurnar.

- Poplist 2 hevur selt munandi betri enn fyrra fløgan. Hetta eru vit sera fegnir um, tí tað høvdu vit ikki vænta. Á fløguni hoyra vit føroyskir sangir, alt innan gamlar slagarar til nýmótans tónleik. Fløgan hevur enn ikki roynt seg í útheiminum, men nógv ferðafólk, hava keypt fløguna, greiður Høgni frá. Nógvar úgávur koma eisini út undan jól. Hetta ger tíverri, at nakrar fløgur detta burtur ímillum. Nógv hava eisini keypt tær fyrstu jólagávurnar, og 3-arin merkir væl jólahýrin millum fólk.

Eftur ætlan kemur enn ein Poplist fløga út komandi ár, við nógvum góðum tilfarið, endar Høgni Zachariassen.

# Teitur í Føroyum



*Nu ber til at uppliva Teit Lassen á palli í Føroyum*

TÍÐINDASKRIV
*frá Norðurlandahúsinum*

Leygarkvøldið hin 6. desember klokkan 19:30 er Teitur í Høllini í Norðurlandahúsinum. Hetta er einasta solokonsertin sum verður í Føroyum, nú hann eftir fimm mánaðir í Norðuramerika kemur aftur til Evropa.

Næstu ferð Teitur verður at hoyra í Føroyum verður á Listastevnu Føroya, sum verður hildin í døgunum 6.- 15. august 2004.

Atgongumerkjasølan til konsertina leygarkvøldið hin 6. desember er byrja.